Uppskot til semju millum

**Føroya Reiðarafelag** øðrumegin

og

**Føroya Fiskimannafelag,**
**Maskinmeistarafelagið** og
**Føroya Skipara- og Navigatørfelag** hinumegin

Í felagsreglum verða gjørdar hesar broytingar:

**§ 17. Frádráttir**

Nýtt stk. 3.

a) Alment ásett veiðugjøld eru loyvdir frádráttir.

b) Tá rættindi eru keypt, eru loyvdir frádráttir:

1. Av upphædd, samsvarandi alment ásettum veiðigjaldi, 100%, og
2. Av upphædd sum er tvær ferðir (1), frádrigið (1) 50%, og
3. Av upphædd sum er tríggjar ferðir (1), frádrigið (1) og (2) 50%

c) Tá talan er um keypt fiskirættindi, har ikki er ásett alment veiðigjald, verður nýttur sami frymil, tó soleiðis, at ístaðin fyri alment ásett veiðigjald, verður í (1) brúkt 100 oyru.

d) Fyri rættindi, sum keypt eru áðrenn 1. apríl 2019, og verða fiskaði aftaná hendan dag, er galdandi sami frymil sum frammanfyri, við tí broyting, at loyvdur frádráttur:

1. Av upphædd sum er omanfyri (1) frádrigið (1) 75%

e) Keyp av føroyskum kvotum og/ella fiskidøgum millum føroysk skip er ikki loyvdur frádráttur.

**§ 20. Søluvirði**

Nýtt stk. 5

Tá skipið fiskar fyri annan rættindahavara, skal manningin frammanundan hava at vita, hvussu skipið verður avroknað fyri túrin, áðrenn mynstrað verður.

Nýtt stk. 6

Tá eitt skip fiskar av felagskvotu hjá skipi í øðrum skipabólki, skal samlaða søluvirðið koma til avrokning.

Um eingin manning er á skipinum við atgongd til felagskvotuna, verður avrokningin einans gjørd fyri manningina á fiskandi skipinum og tá av øllum søluvirðinum.

**§ 5. Heimferð**

Stk. 1, verður broytt soleiðis: "Tá skipari og manning hava verið mynstraður við skipi í minst 2,5 mánaðir, hevur hann rætt til fría heimferð."

**§ 22. Tryggingar**

Stk. 14. Gjaldið hjá reiðarunum er ásett til kr. 45,00 pr. mann pr. dag.

Stk. 15. Verður ámynstraður skipari ella manning óarbeiðsførur, orsakað av arbeiðsskaða, sum er arbeiðsskaði sambært arbeiðsskaðatryggingingarlógini, hevur reiðari skyldu at rinda munin millum dagpeningaveitingina smb. grein 9, stk. 2 í dagpeningalógini og minstuløn sambært kunngerð um inntøkutrygd. Gjaldsskyldan hjá reiðara stendur við, inntil skipari ella manning aftur er førur fyri at arbeiða, tó í mesta lagi í 30 dagar.

**§ 34. Gildi sáttmálans**

Hesin sáttmáli hevur gildi frá 1. apríl 2019 at rokna. Sáttmálin kann uppsigast við 2 mánaða freist til ein 1. apríl, tó í fyrsta lagi 1. apríl 2020.

Tórshavn hin 10. apríl 2019

**Vegna**
**Føroya Skipara- og Navigatørfelag**

*Annfinnur Garðalíð*
Formaður

*Elias Zachariasen*
Næstformaður

**Vegna**
**Føroya Reiðarafelag**

*Hanus Hansen*
Formaður

*Stefan í Skorini*
stjóri

**Vegna**
**Maskinmeistarafelagið**

*Ólavur Gunnarsson*
Formaður

*Regin Olsen*
Næstformaður

**Vegna**
**Føroya Fiskimannafelag**

*Jan Højgaard*
Formaður

*Sámal Poulsen*
Næstformaður